## Oljuprísurin upp

Tekin um framgongd í amerikanska búskapinum gera, at oljuprísurin hækkar, og í morgun hækkaði prísurin níggjunda handilsdagin á rað, skrivar Bloomberg News. Í morgun kostaði ein tunna av amerikanskari WTI-olju, sum skal latast í februar, 80,11 dollarar, og tað er 75 cent meiri oman fyri prísin nýggjársaftan. Tann dagin hækkaði prísurin 8 cent. Bloomberg News skrivar, at burtursæð frá 21. desember er vísitalið hækkað støðugt síðani tann 14. desember. Tann dagin var prísurin knappliga 70 dollarar fyri tunnuna.




## Blair fyri skotum

Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin Tony Blair stendur nú aftur fyri skotum fyri avgerðina at gera innrás í Irak í 2003. Hesaferð er tað undanmaður hansara í Downing Street, John Major, sum hartar hann. Hann sigur, at hann tók undir við innrásini í Irak, men at hann gjørdi tað út frá teimum upplýsingum, sum Blair kom við, men sum seinni hava víst seg at vera sera ivasamar. Í samrøðu við BBC sigur John Major millum annað, at eitt nú vísti tað seg, at upplýsingarnar um hópoyðingarvápnini hjá Saddam Hussein hildu ikki, tá saman um kom.



*Tað er ongin loyna, at tað er blivið verri hjá verkafólki at fáa endarnar at røkka saman og Ingeborg Vinther sigur, at tað er uttan iva at síggjast aftur í krøvunum, sum verða sett arbeiðsgevarunum, nú allir lønarsáttmálarnir eru sagdir upp*

# Arbeiðsfólk fara at krevja hægri løn

**Øll arbeiðarafeløgini hava nú sagt sáttmálan við arbeiðsgevararnar upp og tað er lítið at ivast í, at eitt av krøvunum verður at lønin skal hækka**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er lítið at ivast í, at eitt krav verður, at lønin skal hækka.

Tað er toluliga greitt, nú øll tey fimm arbeiðarafeløgini hava gjørt av at siga sáttmálan við arbeiðsgevararnar upp.

Sáttmálarnir fara úr gildi á midnát tann 30. apríl og skulu sigast upp fyri fýra mánaða ávaring.

Og nakað fyri jól fekk Føroya Arbeiðsgevarafelag skriv frá øllum fimm arbeiðarafelagnum, har sáttmálin varð uppsagur.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at øll arbeiðarafeløgini hava sagt sáttmálan upp í felag og ætlanin er eisini, at tey skulu samráðast um nýggjan sáttmála í felag.

Umframt Føroya Arbeiðarafelag, er talan um arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufelagið í Havn og og bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík.

### Ringt at siga

Feløgini fara nú at tosa saman um, hvørji krøvini til ein nýggjan sáttmála skulu vera.

Og av tí, at tey ikki hava tosað saman enn, er Ingeborg Vinther varin at siga nakað um, hvørji krøv kunnu koma upp á tal.

Men hon sigur, at ímillum krøvini verður allarhelst eisini krav um hægri løn.

– Tað er ongin loyna, at keypiorkan er minkað og at tað er blivið verri at fáa endarnar at røkka saman, tí alt dýrkar, staðfestir forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at nú fara feløgini at fyrireika eitt samráðingarupplegg og at útvega skjalatilfar, sum skal stuðla upp undir krøvini

Her kann viðmerkjast, at hon hevur áður sagt fyri Sosialinum, at umframt sjálva tímalønina, heldur hon, at tað er neyðugt at hækka ymar viðbøtur, sum hava staðið í stað í fleiri ár fyri ávís arbeiði, nú skulu hækkast.

### Føst løn á fiskavirkjum

Men Ingeborg Vinther staðfestir eisini, at tað verður í øllum førum eitt krav, at ein fastlønarsáttmáli skal gerast fyri tey, sum arbeiða á fiskavirkjum.

– Hetta er eitt krav, sum vit ikki hava slept og sum fer at verða ført fram einaferð afturat, sigur hon.

Hon leggur afturat, at hetta er eitt av teimum týðandi krøvunum frá verkamannafeløgunum.

Seinast gjørdu tit ein trý ára sáttmála. Er tað sannlíkt, at tit gera ein so drúgvan sáttmála einaferð afturat?

– Tað er ilt at siga fyrrenn feløgini hava tosað saman, men eg væntir tað ikki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at skal so drúgvur sáttmáli gerast, skal hann í øllum førum vera serliga góður.

## Prísurin fyri at liva hækkaður yvir 30%

Tá ið fólk siga, at tað er blivið dýrt at liva, er tað ikki tikið úr leysari luft.

Tí tað vísa tey turru tølini eisini.

Tølini vísa, at hesi síðstu 11 árini er tað blivið yvir 30% dýrari at liva.

Hetta sæst í eini uppgerð frá fíggjarmálaráðnum til Løgtingið um gongdina í prístalinum frá 1. januar í 1998 til 1. januar í fjør.

Her eru tølini ikki útgreinað á nakran hátt fyri ymsar vørubólkar, men tilsamans vísa tey eina stóra øking, tí sum tað sæst í talvuni er prístalið fyri 1. januar í 1998 sett til 100, men tann 1. januar í 2009 var tað komið heilt upp á 134,4%.

Sostatt er tað blivið 34,4% dýrari at liva hesi síðstu 11 árini.

### Minka í fjør

Tað sæst eisini á talvuni, er prístalið hesi 11 árini vaksið 2,7% um árið í miðal.

Men ein uppgerð frá Hagstovuni vísir eisini, at hetta síðsta árið er prístalið aftur lækkað eitt aftur.

Frá triðja ársfjórðingi í 2008 til triðja ársfjórðing í fjør, tá ið seinasta uppgerðin varð gjørd, er prístalið lækkað 3,1%, men tað var serliga seinasta ársfjórðing í 2008, at lækkingin var, eftir at príshækkingin í matvørum og brennievni var komin í hæddina og síðani eru teir lækkaðir aftur. Í 2009 er prístalið ikki lækkað nógv, serliga tá ið 1. Ársfjórðingum var farin aftur um bak.



**Prístalið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1998 | 100,0 | 2004 | 117,5 |
| 1999 | 105,6 | 2005 | 119,9 |
| 2000 | 109,6 | 2006 | 120,9 |
| 2001 | 115,7 | 2007 | 124,4 |
| 2002 | 115,3 | 2008 | 131,8 |
| 2003 | 117,9 | 2009 | 134,4 |